# Livandi tónleikur í Miðlahúsinum á ólavsøku

**Miðlahúsið hevur gjørt nógv burturúr ólavsøkuni, síðani tað opnaði fyri tveimum árum síðani. Hetta árið verður einki øðrvísi**



**Eid Spelemannslag (NO):**
Norski spælimannsbólkurin Eid Spelemannslag vitjar Miðlahúsið við tónleiki, sum fevnir so víða, at ein bæði kann hoyra siðbundnar norskar fólkatónar og vælsvingandi tango í somu framførslu. Bólkurin kemur úr Norra, og telur 9 limir. Sum berandi ljóðføri hevur bólkurin øll árini havt "hardingfele": ein norsk fiól, sum er nógv brúkt innan norskan fólkatónleik.
**Leygardag kl. 18 & sunnudag kl. 14**

**Sigrið Rasmussen:**
Talan verður um eina inniliga og hugnaliga løtu, tá ið Sigrið gestar Miðlahúsið sunnukvøldið. Hon fer at tulka kend gospel- og poppløg, og eisini framføra nýggj løg, sum hon sjálv hevur smíðað.
**Sunnudag, kl.22.15-23.00**





**Spælimenninir:**
Tey, ið mynda Spælimenninir eru: Daniel Nielsen á violin, Sharon Weiss á blokkfloytu, Kristian Blak á klaver og Andreas Restorff á bassinum. Nøkur løg verða teirra egnu, meðan traditionell norðurlendskt løg eisini verða at hoyra, tá ið tey fara spæla í nýumvælda Miðlagarðinum.
**Fríggjadag, kl. 17 Miðlagarðinum**



**Høgni Reistrup:**
Høgni hevur í hesum mánaði givið út sína fyrstu fløgu Hugafar á ferð, og tí verður tað serstakliga spennandi, at hoyra hann borðreiða við feskumløgum av fløguni. Við fullum orkestri, ið m.a. telur blásarar og strúkarar, fer Høgni at fylla Miðlahúsið við vøkrum tónum og leitandi yrkingum.
**Sunnudagur kl. 16**



**Elin Heinesen:**
Í nærmastu framtíð gevur Elin út nýggja fløgu, ið ber heiti Yndisløg – ein ferð aftur í farnar tíðir. Talan er um gamlar evergreens, sum Elin, saman við øðrum, hevur umsett til føroyskt. What a Wonderful World, Rose Garden, og Besa Me eru millum kendu sangirnar, ið eru á fløguni og samstundis eisini á skránni, tá ið Elin spælir í Miðlahúsinum. Meðan hon sjálv spælir gittara, fer Kim Hansen at taka sær av klaverfylgispælinum.
**Leygardag, kl. 20**

# Ein øðrvísi lega

**Eitt av spennandi tiltøkunum á ólavsøku er legan DNA. Eingin lega hevur verið sum hendan, siga fyriskipararnir Regin við Skipá og Trygvi Dam**

*Petur Háberg*
*petur@sosialurin.fo*

DNA - stytting fyri Divine Nature from Above - er ein lega, sum samkomurnar Filadelfia, Evangeliihúsið og Oasan skipa fyri. Talan er um eina ungdómslegu, har endamálið sambært fyrireikarunum er at skapa eina nýggja ungdómsmentan:

- Endamálið er at menna gudslívið millum tey ungu. Tá meina vit við, at vit ynskja at skapa eina nýggja fatan av Gudi millum tey ungu í dag, siga fyriskiparnir.

- Og hetta verður ikki gjørt bara eftir einari legu. Tað er nakað, sum tekur tíð. Men DNA er ein liður í hesi menning.

- Fyri nógv er kristindómur bara rammur og forboð. Hetta er ikki rætt, tí tað er so nógv meiri enn tað. Tað er fult av lívið, og tað er hetta, sum vit ynskja boða og fáa fram á ólavsøku.

Legan verður hildin á Læraraskúlanum og er frá 27.-29. juli. Um dagin verður undirvíst í evnum sum evangelisering og persónliga kristna lívið, meðan evangelisering í havnargøtum er á skránni um kvøldið. Býráðið hevur givið leguni loyvi til at nýta Grasagarð og ymisk onnur støð í býnum til sang, drama og annað.

- Tey, sum koma á leguna og vænta, at tað bara verður hugni og tvætl verða skuffað. Tí tað verða nakrir avbjóðandi dagar, har man verður avbjóðaður og strektur eitt sindur, sigur Regin.

- Eg haldi, at moralski standardurin í dag er fallandi. Fríggjakvøld plaga vit at vera úti við Jesus-suppu, og har síggi eg oftani, at fólk liva eitt tómt lív. Og har vilja vit bjóða eitt alternativ.

At ganga runt og geva fólki ringa samvitsku er ikki endamálið við evangeliseringini:

- Vit ynskja als ikki at peika eftir fólki og trýsta ting upp í høvdið á teimum. Vit vilja vera eitt positivt íkast til ólavsøkuna, sigur Regin at enda.